VÍF-KÍF 26-27 (12-16):

# Finalusessurin í vanda

**Hóast KÍF var um at missa takið, so eydnaðist teimum við trimum sekundum eftir at skjóta avgerandi málið móti VÍF. Og nú er finalusessurin hjá vestmenningum als ikki so vísur longur**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Størsta partin av endaspælinum hevur spurningurin bara verið, hvør skuldi fylgja VÍF í FM-finaluna. Vestmenningar hava støðugt hildið sær á oddaessinum í deildini, og við einum sigri á KÍF høvdu teir møguleikan til mest sum at sementera oddasessin.

### Hóttu við sorli

Úrslitið staðfestir, at hetta ikki eydnaðist hjá VÍF. Og tað er freistandi at siga, so langt ífrá.

Kollfirðingar vóru nevnliga alla tíðna grammara liðið sunnudagin. VÍF fekk kanska betri byrjanina, men so tóku gestirnir yvir. Sum ikki eina ferð var Damir Oros framúr væl upplagdur, og líkamikið, hvussu vertirnir royndu, so eydnaðist ikki at seta skotsterkasta spælaran í landinum út av spælinum.

Og tá Óla Kristian Djurhuus í málinum so eisini hevði ein av sínum heilt góðu døgum, stóð av álvara á hjá VÍF.

Sum minuttirnir gingu eftir steðgin, so bendi alt eisini á veruligan stórsigur til gestirnar. Spakuliga toygdu teir leiðsluna alt meira, og hóast time-out varð tikið av VÍF-beinkinum, so gjørdist leiðslan eitt skifti heili seks mál.

### Trý sekund eftir

Miðskeiðis í seinna hálvleiki fekk VÍF tó fatur um endan. Damir Oros noyddist av vøllinum eina løtu, og hetta ørkymlaði kollfirðingum nakað. Munurin minkaði støðugt, og bara fimtan sekund undan dystarloki komu vertirnir upp á javnleikin.

Kollfirðingar vóru tó ikki lidnir, og við seinasta skotinum í dystinum sendi Gert Hansen eitt undirhondsskot avstað. Bólturin smeyg sær í meskarnar, og so var fagnaðurin ovurstórur. KÍF er enn við í stríðnum um finalupláss, men vestmenningar skulu nú til at ansa sær heilt væl, um teir ikki skulu missa sessin.

FAKTA

**VÍF-KÍF 26-27 (12-16)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 5, Harald Bjørgvin 5, Agnar Joensen 4, Ingi Olsen 4, Áki G. Olsen 3, Sjúrður Poulsen 3, John Zachariassen 1, Regin Joensen 1
**KÍF:** Damir Oros 11(2), Daniel Rapa 6, Gert Hansen 5, Rógvi Weihe 2, Teitur Joensen 1, Niklas Reginsson 11, Finn Heri Johannesen 1
**Brotskøst:** VÍF 1, KÍF 3
**Útvísingar:** VÍF 7, KÍF 3
**Diskvalifikatiónir:** VÍF 1 (3X21 minuttir)
**Dómarar:** Uni Wardum & Hannis Wardum

VB-StÍF 25-25 (15-14):

# StÍF trívist í Vági

**Av fýra møguligum hevur StÍF havt tey trý við sær heim, tá tær hava vitjað í Vági í ár**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VB-kvinnurnar kunnu helst fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri, at tær ikki fingu fulla úrtøku, tá tær høvdu vitjan av StÍF sunnudagin.

Hóast dysturin er av teimum meira týdningarleysu, um hugsað verður um skipanina av kappingini, so hevði VB ivaleyst ætlað sær bæði stigini. Eisini hóast liðið enn eina ferð mátti vera Daivu Toumaite fyriuttan, nú hon tykist hugsa mest um at vera til reiðar, tá hálvfinalurnar skulu spælast.

StÍF mest sum vissaði sær sætið í hálvfinaluni, tá tær fyri viku síðani spældu javnt í útidystinum móti Kyndli, men fyri tað høvdu tær als ikki í hyggju at slappa av í Vági. Frá fyrsta bríksli stríddust tær fyri sínum møguleika, og tað gav eisini at bíta hjá heimaliðnum, sum eftir strævnan útidyst í Klaksvík ikki tóktist hava yvirskotið at toga seg leyst.

Gongdin eftir steðgin var tann sama, men við einum tíggju minuttum eftir tóktist VB tó hava tikið avgerandi fetið móti sigrinum. Trý mál á rað skaptu eitt glopp, og tó at StÍF royndi at svara aftur, so gekst illa. Seianstu fýra minuttirnar stóð tó púrasta fast hjá VB. Við einum spælara í undirtali eydnaðist tó at fáa brotskast, sum kundi avgjørt dystin, men tikið varð ikki av, og so kundi StÍF stjala annað stigið, tá tær javnaðu í seinastu løtu.

Kanska eitt týdningarleyst stig á tann hátt, at hetta ikki broytir nakra raðfylgju. Men hetta staðfesti í øllum førum veruleikan, at tað verður StÍF, sum skal spæla hálvfinalu móti Stjøruni, tá millumspælið hjá kvinnunum er av.

FAKTA

**VB-StÍF 25-25 (15-14)**
**Málskjúttar**
**VB:** Ivana Ljubicic 6(2), Rannvá Johannesen 4, Laila Jespersen 4, Maja Sølvsten 3, Bára Mortensen 2, Theresa Joensen 2, Una Egilsdóttir 2, Svava Vestergaard 1, Miriam Michelsen 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 6, Rebekka Justinussen 5(2), Malan Petersen 4, Ásgerð Káradóttir 3, Ata Gregersen 3, Guðrun Danielsen 2, Bára B. Danielsen 2
**Brotskøst:** VB 3, StÍF 3
**Útvísingar:** VB 4, StÍF 2


## Bókhalds- og roknskaparfólk
### til P/F Statoil Føroyar

Søkt verður eftir fólki við bókhalds- og roknskaparførleika til støðroknskapardeildina hjá P/F Statoil Føroyar í Tórshavn. Talan er um eitt avloysarastarv í fyribils 6 mánaðir.

Støðroknskapardeildin hevur sum endamál at veita roknskapartilfar til leiðslu og støðleiðarar, umframt at gera umsitingarligar uppgávur fyri støðirnar.

**Starvið**
Arbeiðið fevnir um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði
- Ymiskar uppgerðir
- At veita hjálp til gerð av roknskapum

**Vit bjóða**
Tann ið settur verður, kemur at vera ein partur av toyminum á støðroknskapardeildini. Vit kunnu bjóða eitt starv í einum dynamiskum og mennandi umhvørvi. Lønin verður ásett sambært avtalu.

**Førleiki**
Vit sóknast eftir einum ágrýtnum starvsfelaga, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og sum sær týdningin av at veita eina góða tænastu til teir áhugabólkar, ið eru knýttir at støðroknskapardeildini.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boga P. Nielsen roknskaparleiðara fyri Statoil-støðirnar á tlf. 343500.

Umsóknarfreistin er 28. februar.
Umsóknin skal sendast til:

**P/F STATOIL FØROYAR**
Fíggjardeildin
Vestara Bryggja 2
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða um 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.

STATOIL



EL-SERVICE
FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

## Elektrikkarar

Vit sóknast eftir elektrikkarum til arbeiði í Føroyum, sum kunnu byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
- el-innleggingar umborð á skipum
- el-innleggingar í bygningar á landi
- talvur
- stýringar
- o.a.

**Vit vænta at tú hevur:**
- úbúgvin sum elektrikkari
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tú kann rokna við at skula arbeiða uttanlands í styttri tíðarskeið.

Løn sambært avtalu.

Áhugaði kunnu venda seg til El-Service á telefon 47 19 00.

Á El-Service arbeiða uml. 40 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving. Vit arbeiða við framleiðslu, innstallatión, eldsløkkiútgerð og offshore.

Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings.

Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkent.